# Vrakið av Murman beinast burtur

SKIPSBROT

*Beinta Anthoniussen, praktikantur*

Andøy kommunan í Noregi vil hava vrakið av russiska verksmiðjutrolaranum, Murman, burtur, har tað liggur.

Kommunan heldur, at vrakið liggur á einum óhepnum staði, har vandi er fyri, at tað brotnar og kann gerast ein hóttan fyri umhvørvið, hóast eingin olja er eftir í skipinum.

# "Tricolor" tømast fyri olju

UMHVØRVI

*Beinta Anthoniussen, praktikantur*

Fyri nøkrum vikum síðan byrjaðu teir at taka oljuna upp úr skipinum, "Tricolor", sum fórst á grunnum vatni í ensku kanaluni, 14. desember.

Væntandi fór arbeiði, sum verður gjørt av felagnum, Smith í Hálandi, at taka einar 15-25 dagar.

Hetta upplýsa norskar keldur.

# Byggimálsviðgerð hjá Arbeiðseftirlitinum

**Arbeiðsumhvørvislógin setir krøv til øll arbeiðs-pláss. Við heimild í arbeiðs-umhvørvis-lógini er kunngerð um inn-rætting av føstum arbeiðsplássum sett í gildi**

TÍÐINDASKRIV

*Arbeiðseftirlitið*

§ 7: Stk. 2. Ætlanir um nýbygging ella umfatandi innrætting ella broyting av bygningum, hølum og tøkniligum anleggum og útbúnaði v.m. skulu ummælast av Arbeiðseftirlitinum, áðrenn innrætting ella broyting verður gjørd. Tað sama er galdandi, tá ið bygningar, hølir, øki v.m. skulu útleigast til vinnuligt endamál. Tá skal endamálið við nýtsluni av teimum hava verið hjá Arbeiðseftirlitinum til ummælis áðrenn tað verður útleigað.

Soleiðis stendur tað skriva í lógini.

Hvat merkir so hettar og hvør eigur at hava hettar í huganum, t.d. tá ein bygningur skal byggast til vinnuligt endamál, ella eitt høli skal innrættast til arbeiðspláss?

Nýbyging og umfatandi innrætting ella broyting av bygningum og hølum.

Arbeiðseftirlitið skal hava tekningar og aðra neyðuga dokumentatión, s.s.:

- støðuplan, ikki minni enn 1:1000
- flatmyndir av húsunum í máli í minsta lagi 1:100
- tvørskurðir í minsta lagi 1:50
- vinnugrein, hvussu nógv fólk talan er um o.s.fr.,

soleiðis at til ber hjá Arbeiðseftirlitinum, at meta um byggingin stendur mát við tey krøv sum eru sambært arbeiðsumhvørvislógini.

Hetta kravi er eisini galdandi fyri kommunur. Kanska serliga fyri kommunur.

Sambært aðrari lóggávu hevur ein kommuna ikki loyvi til at geva byggiloyvi til eina verkætlan fyrrenn hon hevur tryggja sær at øll neyðug loyvi fyriliggja frá øðrum mynduleikum, sum kunna hava krøv til byggingina.

Í kunngerð um kommunala byggimálsviðgerð, nr. 57 frá 27. apríl 2001 stendur soleiðis:

§ 1. Kommunustýrir kunnu ikki geva byggiloyvi ella nýtsluloyvi, fyrr enn tað er staðfest, at tað sum søkt verður um, eisini kann góðkennast av øðrum myndugleikum, ið sambært aðrari lóggávu hava heimild at seta krøv til byggingar.

Barnagarðar, útibarnagarðar og onnur ansingarpláss eru at meta sum arbeiðspláss, tí har eru vanliga fólk í arbeiði, at ansa børnunum, og koma hesir bygningar/hølir tí eisini undir arbeiðsumhvørvislógina.

Onnur, ið eiga at hugsa um arbeiðsumhvørvislógina, í samband við byggimálsviðgerð eru t.d.:

- ráðgevnadi virkir
- arbeiðsgevarar
- virkisleiðslur
- útleigarar o.o.

Vegleiðing um innrætting av føstum arbeiðsplássum (V-A001-1).

Arbeiðseftirlitið brúkar reglar, ið samsvara við ta danska "Bygningsreglementet", tá byggimál verða viðgjørd.

Til hettar endamál hevur Arbeiðseftirlitið gjørt eina vegleiðing har tað er greitt frá hvørjir kapitlar verða brúktir.

Vegleiðingin liggur á heimasíðuni hjá Arbeiðseftirlitinum, www.arb.fo, undir lógir-vegleiðingar, men kann eisini fáast við at venda sær til Arbeiðseftirlitið.

Vegleiðing um útgangsumstøður í sambandi við føst arbeiðspláss (V-A001-2).

Umframt omanfyri nevndu vegleiðing, um innrætting, verður eisini víst til hesa vegleiðing, um útgangsumstøður, sum greiðir frá hvørji krøv eru til rýmingarvegir á einum arbeiðsplássi.

Hendan vegleiðingin liggur somuleiðis á heimasíðuni hjá Arbeiðseftirlitinum, www.arb.fo, undir lógir-vegleiðingar, og kann eisini fáast við at venda sær til Arbeiðseftirlitið.

# Nýggjur fiskivinnuskúli í 2005

TÍÐINDASKRIV

Ein arbeiðsbólkur handaði í vikuni landsstýrismanninum í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, álit, har mælt verður til at fara undir at byggja nýggjan Fiskivinnuskúla í Vestmanna. Skúlin skal standa liðugur í 2005.

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna hevur havt vánaligar hølisumstøður, síðan skúlin byrjaði í 1989, men nú ætlar landsstýrismaðurin í mentamálum at gera nakað við umstøðurnar hjá skúlanum.

Síðsta summar setti landsstýrismaðurin ein arbeiðsbólk at arbeiða við hølisspurninginum, og í dag lat bólkurin landsstýrismanninum sítt tilmæli.

Vestmanna Kommuna vísti síðsta summar Mentamálaráðnum á trý grundøki í bygdini til bygging av einum nýggjum Fiskivinnuskúla. Bólkurin mælir til, at ein nýggjur skúli verður bygdur á økinum við ferjuleguna Inni á fjørð í Vestmanna. Skúlin skal kunna hýsa umleið 100 næmingum og skal harafturat hýsa einum øktum skeiðsvirksemi í mun til í dag. Talan er um ein bygning, sum er 1200 fermetrar til víddar. Kostnaðurin verður fyribils mettur til 22 milj. kr.

Men byggingin av einum nýggjum Fiskivinnuskúla er bara 1. byggistig í eini størri ætlan. Byggingin verður skipað soleiðis, at tað skal bera til at byggja ein Sjódepil afturat skúlanum. Á sumri í 2001 lat ein nevnd, har vinnan saman við øðrum avvarðandi pørtum var breitt umboðað, landsstýrismanninum tilmæli, har mælt varð til at víðka um virksemið hjá Fiskivinnuskúlanum við einum Sjódepli. Depilin skal í framtíðini veita tænastur til føroyska fiskaídnaðin og til alivinnuna, og skal m.a. hýsa eini menningar- og kunningareind.

Hans Andreas Dam Joensen, undirvísingarleiðari í Mentamálaráðnum, Ole Jensen, landsarkitektur, og Jákup Andreasen, skúlastjóri á Fiskivinnuskúlanum, hava mannað nevndina, sum hevur latið landsstýrismanninum tilmæli um, hvussu farast skal fram í samband við bygging av einum nýggjum Fiskivinnuskúla í Vestmanna stendur í tíðindaskrivi frá Mentamálastýrinum.



*Myndatekstur: Landsstýrismaðurin fær handað álitið frá arbeiðsbólkinum. Frá vinstru, Ole Jensen, arkitektur hjá LV, Hans Andr. Dam Joensen, undirvísingarleiðari í Mentamálaráðnum og formaður, Jákup Andreasen, skúlastjóri í Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, og Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður.*

# ítróttur

Nr. 16 • fríggjadagur • 24. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



*John Sigurd og KÍF kláraðu ikki at halda fast móti Kyndli*

Kyndil-KÍF III 44-23 (21-8):

## Ivaleyst

**Kyndil helt seg burtur frá deyðssyndini um at undirmeta mótstøðuliðið, og so var tað ikki stórvegis, sum eykamenninir hjá KÍF kundu gera**

COCA-COLA KAPPINGIN, MENN

*Jákup Mørk*

Bara tað, at triðjudeildarliðið hjá KÍF skuldi vera umboðað í hálvfinaluni í steypakappingini, er ivaleyst nakað, sum var fullkomuliga óhugsandi fyri tey flestu. Ikki minst eftir at liðið í fjórðingsfinaluni hitti eitt av oddaliðunum í føroysku landskappingini, Neistan.

Men tá Neistin upp á tað grovasta undirmetti mótstøðuna, tóku kollfirðingarnir av, og tí vóru tað teir, sum áttu tørn, tá fyrra hálvfinalan móti Kyndli stóð á skránni mikukvøldið.

Her steðgaði ævintýrið so eisini hjá KÍF, tí Kyndil lat ongan iva verið eftir, tá teir fóru á vøllin.

Uttan stórvegis roks settu teir seg frá fyrsta bríksli á dystin, og tann munurin, sum eigur at vera millum liðini, kom týðiliga til sjóndar. Eftir einum lítlum korterið var allur spenningur longu tikin úr dystinum, og tað setti so eisini spurnartekin við, hvørt skipanin við tveimum hálvfinalum er hin rætta.

### Ein ella tveir

Tað er nevnliga so, at við bert einum dysti at avgera slíkar uppgerðir við, gerst sannlíkindið fyri teimum óvæntaðu úrslitunum mundandi størri. Kanska merkir tað ikki altíð, at tað eru tey bæði sterkastu liðini í landinum, sum hittast í finaludystinum, men hinvegin merkir tað, at tað var liðið, sum var betri á leikdegnum, sum vinnur seg víðari. Júst hetta er eisini sjarman við steypakappingum, og eitt nú var KÍF neyvan í hálvfinaluni, um talan hevði verið um tvær fjórðingsfinalur.

Og so er tað eisini so, at hetta leggur eina óneyðuga byrðu á liðini, um eitt av veikaru liðunum vinnur seg langt í kappingini. Í øllum førum mundi neyvan nakar av kollfirðingunum havt nakað ímóti, um teir høvdu sloppið undan at leikt seinnu hálvfinaluna móti Kyndli. Ein dystur, sum má sigast at vera fullkomuliga uttan týdning, nú munurin longu er somikið stórur.

**Dysturin í tølum**

**Kyndil-KÍF III 44-23 (21-8)**

Málskjúttar:

Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 9(3), Finnur Hansson 8, Heini Bendtsen 5, Jacob Jónsson 3, Ken Zachariasen 3, Josef Abrahamsen 3, Janus Einar Sørensen 3, Rúni Mohr 2, Gunnar Wardum 2, Ák Poulsen 1

KÍF: Regin Petersen 7, Jákup Dam 6(1), Fríðrik T. Joensen 4, Sune Davidsen 2, Gert HAnsen 2, Jens Marni HAnsen 1, Jón Sigurd Gleðisheygg

Brotskøst: Kyndil 3, KÍF 3

Útvísingar: KÍF 3

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen.

VÍF-StÍF 23-24 (13-12):

## StÍF fyri triðju ferð

**Strandingar tykjast stevna móti triðju steypafinaluni á rað, eftir tepran sigur í Vestmanna**

COCA-COLA KAPPINGIN, MENN

*Jákup Mørk*

Tvey ár á rað hava strandingar vunnið føroysku steypafinaluna, og nú eftir fyrru hálvfinaluna mikukvøldið tykjast teir vera ávegis einum reinum hattrick í so máta.

Fyri triðju ferð í ár eydnaðist nevnliga StÍF at vinna dyst á VÍF, og tó at talan var um tepran sigur móti einum skerdum liði, so gevur hetta í øllum førum strandingunum fyrimunin undan seinnu hálvfinaluni.

Tað var nevnliga eitt skert VÍF-lið, sum tók ímóti í Vestmanna mikukvøldið. Eitt er, at Sámal Joensen ikki hevur verið við tað mesta av árinum vegna knæskaðan, men at VÍF nú eisini skuldi royna seg uttan Inga og Áka Olsen, gjrødist kanska ov nógv av tí góða hjá liðnum. Neyvan man nakar hópur í landinum vera somikið breiður, at hann tolir missin av trimum slíkum leikarum, og tað toldi VÍF so heldur ikki, tó at tað var nær við.

Fyri tað mesta var tað nevnliga so, at vestmenningar stóðu betri á vøllinum mikudagin. Við Daniel Rápa og Piti Negru á bakkplássunum eydnaist alla tíðina at halda trýstinum á strandingunum, sum hinvegin ikki fingu sítt spæl at koyra nóg væl.

Men tað var kortini so, at væntandi breiddin kostaði í longdini. Bæði miðskeiðis í fyrra og í seinna hevði VÍF togað seg nakað burturfrá, men í báðum førunum eydnaðist tað hjá StÍF at svara aftur. Í seinna hálvleiki var munnurin annars 3 mál, tá eitt korter var eftir, men við seks málum á rað koppaðu strandingar øllum á høvdið. Restina av dystinum megnaðu vestmenningarnir bert tríggjar ferðir at senda bóltin inn um rumenska málverjan hjá StÍF, og tað var so ikki nóg mikið.



*Við leikandi venjaranum, Costin Dumitrescu, sum stórskjútta, eydnaðist fyri triðju ferð í ár hjá StÍF at basa VÍF*

*savnsmynd*

Sum nevnt, so er sjálvandi einki avgjørt enn, nú bert eitt mál skilir partarnar, men tað er so tann fyrimunurin, sum StÍF hevur við á vøllin til seinnu hálvfinaluna. Seinnu árini hevur StÍF eisini havt eitt gott tak á VÍF og ikki minst er hetta komið til kennar í steypakappingini.

Munurin millum tey bæði árini og so nú, tykist tó at vera, at í ár hava strandingar nógv meira at hugsa um í landskappingini, har teir eru oddalið. Áður hevur VÍF verið ov sterkt fyri hini í longdini, og tí hevur StÍF kunna savnað alla orku um júst hesar dystirnar, men í ár er støðan ein onnur.

Leikliga er talan jú um tvey sera jøvn lið, og tí verður tað ikki minst avgerandi, hvussu leikararnir eru fyri sálarliga, tá seinna hálvfinalan verður á skránni.

**Dysturin í tølum**

**VÍF-StÍF 24-23 (13-12)**

Málskjúttar:

VÍF: Áki G. Olsen 6, Piti Negru 6, Daniel Rápa 5, John Zachariasen 3, Ólavur Brimnes 3

StÍF: Costin Dumitrescu 10, Bent Djurhuus 3, Artur Johansen 3, Sveinur Justinussen 3(2), Kristjan Petursson 2, Jón Rasmussen 2, Alexandur Johansen 1

Brotskøst: StÍF 2

Útvísingar: VÍF 1, StÍF 2

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen